# ast



*Neistin stríddist, og leingi vóru tær væl við. Men at enda máttu Ása og tær geva seg undir Katarinu og hinum stjørnunum*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

Ístaðin sýndu meistararnir nú, at veruligi styrkismunurin millum liðini bæði var í minsta lagi ein klassa.

Serstakliga fekst verjan hjá Stjørnuni nú at rigga. Neistin slapp snøgt sagt ikki framat skotmøguleikum, og tí gjørdist talan í nógvum førum um 50/50 royndir. Og tá Fríða Petersen nú eisini hevði funnið rætta formin fram, beyð ikki bøtur. Helena royndi alt tað, sum hon var ment, at halda liðnum í dystinum, men hóast fleiri framúr bjargingar, so var hetta ov lítið.

At Neistin bara fekk tvey mál fyrstu 20 minuttirarnar eftir steðgin, sigur helst sína søgu um munin, sum nú var íkomin. Stútt og støðugt øktu klaksvíkskvinnurnar nú um munin, og tá alt kom til alt, var eingin ivi. Favorittarnir vunnu væntða sigurin, men tær vórðu fyri ein stóran part mintar á, at einki kemur av sær sjálvum. Heldur ikki ein steypasigur.

Hóast hetta, so er nokk eingin ivi um,at tær úr Neistanum vóru við til skapa eina góða finalu. Tær royndu eftir møguleikanum, tá hann var har, og hóast støðan gjørdist alt meira vónleys, sum dysturin leið, so góvu tær ongantíð skarvin yvir. Seinasta útvísingin – og harvið reyða kortið - hjá Marjun Tróndarson, var helst meira úttrykk fyri einum avriki, har allar góvu seg 100%. At tað so ikki var nóg mikið, kunnu tær bláu ikki lastast fyri.

### Fakta um dystin

**Stjørnan-Neistin 22-17 (10-11)**
**Málskjúttar**
**Stjørnan:** Katarina Stepanov 9(2), Alina Olaru 5, Una Olsen 2, Joan M. Djordjevic 2(1), Anna Kristina Samson 2, Annika Ljósstein 1(1), Bára S. Klakstein 1
**Neistin:** Simona Petersen 5(1), Marjun Tróndarson 4(3), Ása á Neystabø 2, Lív Sørensen 2, Annika Thomsen 2, Kára á Dunga 1, Mildrið Jacobsen 1
**Brotskøst:** Stjørnan 6, Neistin 5
**Útvísingar:** Stjørnan 8, Neistin 7
**Diskvalifikatión:** Neistin 1 (3X2 minuttir)
**Dómarar:** Hannis Wardum & Uni Wardum. Løgdu frá fyrsta bríksli eina greiða og kontanta linju, og at kalla alla tíðina eydnaðist eisini at halda fast um hesa.

# Stuttligari og stuttligari

Hóast talan var um triðju ferð á rað, at Una Olsen sum liðskipari skuldi taka móti steypi, tóktist hetta ikki vera nakað, sum er um at blíva ov gerandisligt fyri hana.

– Nei. Hetta er akkurát líka stuttligt hvørja ferð. Kanska er tað enntá bara stuttligari og stuttligari, helt hon fyri, tá vit eftir dystin fingu orðið á hana.

Fyrstu longu løtuna var annars ikki so nógv, sum bendi á, at talan skuldi gerast um nakað steyp til Unu og Stjørnuna. Neistin beit í øllum førum meira frá sær, enn tey flestu høvdu roknað við, og spurd beinleiðis, so viðgekk Una eisini, at tær kanska høvdu undirmett mótstøðuna.

– Tað er sjálvandi tað, sum tú ongantíð skalt gera, og tað var so heldur ikki nakað, sum vit ætlaðu. Men tað hevur nokk verið soleiðis onkra staðni í bakhøvdinum. Vit fingu so als ikki okkara spæl at koyra, og serliga í verjuni gekk tað illa.

– Tíbetur megnaðu vit tó at reisa okkum. Hálvleikin brúktu vit til at fáa nøkur ting upp á pláss, og tíbetur gekk tað so eisini hóast alt, staðfesti fegni liðskiparin at enda.

**-jm**



*Stuttligari og stuttligari. Una Olsen hevur nú tikið móti tveimum Coca-Cola og einum FM-steypi, men framvegis er tað líka stuttligt, heldur hon*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

# Vónbrot

Hóast tey flestu mundu vera samd um, at Neistakvinnurnar so avgjørt høvdu verið við til at skapt eina góða finalu, so hingu tær skilliga við høvdinum, tá dysturin var liðugur.

Ikki minst var vónbrotið stórt um, at tær í seinna hálvleiki í so lítlan mun megnaðu at trýsta Stjørnuna.

– Vit fóru í øllum førum eftir møguleikanum. Vit góvu okkum alt tað, sum vit vóru mentar, og tað kostaði sjálvandi eisini kreftir. Kanska ov nógvar, segði Ása á Neystabø eftir dystin.

– Kanska var munurin eisini, at Stjørnan hevur ein breiðari hóp enn vit. Tað inniber, at vit lutfalsliga nýta fleiri kreftir, og tað haldi eg eisini móti endanum.

Men tit góvu í øllum førum favorittunum ein skarpan gang. Kunnu tit hóast alt ikki vera væl nøgdar um tað.

- Tað veit eg ikki. Í løtuni eru vit í øllum førum sera vónbrotnar. Tá tú spælir eina finalu, so spælir tú fyri at vinna, og tað megnaðu vit so ikki, staðfesti hon at enda.

**-jm**



*Hóast avrikið væl og virðiliga varð góðkent av áskoðarunum, so vóru tað nakrar vónbrotnar Neista-kvinnur, sum eftir dystin máttu hyggja at steypahandanini*
*Mynd: Álvur Haraldsen*